## VIÐMERKINGAR

# Verkfalshóttaninar hanga framvegis yvir útoyggjum

JASPUR VANG
Tvøroyri



Í løtuni valdur sum heild friður á arbeiðsmarknaðinum. Landsstýri og samgongan hava tí gyltan møguleika til nú í "friðartíðum" at finna fram til eina loysn, sum tryggjar, at út-oyggjar, Sandoy og Suðuroy ikki aftur verða tiknar gíslar og ferðafólka- og farmaflutningurin til hesi øki aftur verður lagdur lamin, næstu ferð sáttmálasamráðingar verða.

Orðaskifti um visiónir, alheimsgerð, tolsemi, útbúgvingar, gransking v. m., sum seinastu mánaðirnar hevur verið á almennu politisku dagsskránni, er sjálvsagt viðkomandi og neyðugt. Tó mugu politik-ararnir ikki gloyma gerandisdagin burtur ímillum, men loysa teir trupulleikar, sum ferð eftir ferð hava verið útjaðarøkjunum í Føroyum til miklan skaða.

Vit kunnu fegnast um, at t. d. Heima á Sandi, í Hvalba, á Tvøroyri og í Vági nú aftur er virksemi á teimum fiskavirkjum, sum fyri bert fáum mánaðum síðani antin vóru afturlatin ella vóru í vanda fyri at lata aftur. Virkisfús vinnulívsfólk góvu ikki skarvin yvir, men stríðast dagliga fyri at fáa tað at bera til í fiskivinnuni, sum, antin vit vilja vera við tað ella ikki, er grundarlagið undir føroyska landsbúskapinum, eisini eftir ár 2015. Ein avgerðandi fortreyt fyri, at fiskavirkjunum og øðrum virkjum og fyritøkum uttan fyri meginøkið skal verða lív lagað er, at sjóvegis flutningurin til meginøkið og harvið umheimin er støðugur og álítandi. Landspolitikararnir hava skyldu til at tryggja vinnuni um alt landi tryggar karmar at virka innan. Soleiðis hava landspolitikararnir eisini skyldu at tryggja álítandi og støðugan flutning um fyrðir og sund.

Undir vinnupolitiska orðaskiftinum á Løgtingi týsdagin í farnu viku, heitti formaður Sambandfloksins á landsstýrismannin í samferðslumálum og vinnumálum um at bera so í bandi, at funnin verður ein varðandi loysn, sum tryggjar, at útoyggjar, Sandoy og Suðuroy ikki aftur verða tiknar gíðslar, næstu ferð ósemja stingur seg upp á arbeiðsmarknaðinum. Vónandi tekur landsstýrismað-urin áheitanina frá samgongufeløgum sínum til eftirtektar og fer til verka í álvara.

Viðbrekin politisk mál, ið ikki fáa nøktandi viðgerð og harvið verða endaliga loyst, stinga seg við jøvnum millumbilum upp, gera skaða og skapa rumbul. Politiski áhugin í at finna varðandi loysnir á slíkum málum tykist tó fána burtur, tá fjølmiðlarnir, eftur bert stutta og mangan øsingar- og gølu-kenda, men grunnskygda viðgerð, sleppa málunum aftur. Soleiðis er eisini við afturvendandi verk-føllunum, sum raka útoyggjar, Sandoy og Suðuroy so meint. Fjølmiðlarnir válka sær eina stutta stund í verkfalshóttanum og verkføllum, men sleppa so málinum aftur. Tað hevði verið fjølmiðl-u-num til heiðurs, um teir viðgjørdu ein slíkan afturvendandi trupulleika í álvara, lýstu fylgjurnar av ótryggleikanum og verkføllunum, fylgdu málinum upp og við jøvnum millumbilum varpaðu ljós á málið.

# Hví ikki fyrst vitja heimsins fremstu lond í OECD

REIDAR NÓNFJALL



Løgmaður hevur saman við einum fylgi av føroyskum vinnulívsfólkum valt at vitja India. Endamálið er at skapa politisk og vinnulig sambond millum Føroyar og India, og ferðin er annars ein liður í politisku visiónini 2015 um globali-sering.

Tað er skeivt fyrst at vitja India í sambandi við visión 2015. Løgmaður við fylgi átti heldur at vitja heimsins fremstu lond í OECD og har fingi innlit í, hvat vit í Føroyum politiskt, samfelagsliga og vinnu-liga skulu liva upp til í sambandi við idealmyndina at gerast eitt av heimsins fremstu londum. Tað er ikki greitt, hvat vit skulu liva upp til í Føroyum, eitt nú tí, at heimsins fremstu lond í OECD eru so ymisk búskaparliga og eru í ávísum førum eisini heilt øðrvísi samfelagsliga innrætta.

Tað hevði verið ógvuliga náttúrligt fyrst at avstemma Føroyar við heimsins fremstu lond í OECD og síðan um 1 ella 2 ár vitja fjarskotin lond. Hetta tí, at vit í skjótt eitt ár, ikki hava hoyrt annað enn, at vit skulu samanbera okkum við heimsins fremstu lond í OECD, men uttan at politiski myndugleikin ger sær greitt, hvat tað veruliga inniber.

Royndirnar vísa, at vitjanir av slíkum slag, sum her verða gjørdar, hava størst gagn og avkast, um so er, at ein vitjan og kunning kann brúkast til ítøkjuligar verkætlanir, sum eru í gongd á fyritøkuni ella í skipanini, har tann vitjandi arbeiðir. Vandin fyri, at lítil og ongi ítøkjulig úrslit spyrjast burturúr einari óformligari vitjan er sjálvandi serliga stórur, tá talan eisini er um politiska kunningarferð.

# Aftursvar til blaðstjóran á Sosialinum

HEINI GAARD
Formaður í Føroya Blaðmannafelag

Hetta aftursvar snýr seg einans um tann partin av lesarabrævinum hjá Eiriki Lindenskov, blaðstjóra í Sosialinum, sum umhandl-aði samskiftið millum Blaðmannafelagið og blaðstjóran og støðutakanina hjá felagnum. Eg giti, at Útvarp Føroya dugur at svara fyri seg. Lesarabrævið hjá Eiriki Lindenskov stóð í Sosialinum týsdagin 28. februar.

Endurgevingin hjá Eiriki Lindenskov er beinleiðis skeiv og tað má rættast.

Men fyrst og fremst skal staðfestast, at Blaðmannafelagið sjálvt ger av, hvørji mál felagið velur at taka upp - og eingin annar.

Blaðmannafelagið er ikki ein almennur myndugleiki og hevur tískil heldur ikki hoyringsskyldu. Hóast so fekk Eirikur Lindenskov yvirlýsingina sendandi áðrenn hon var send fjølmiðlum. Roynd var eisini gjørd at fáa orð á Eirik Lindenskov umvegis telefon áðrenn yvirlýsingin var send út, tó uttan eydnu. Eirikur Lindenskov hevur ONGANTÍÐ sett seg í samband við Blaðmannafelagið, sum hann sigur seg hava gjørt. Blaðmannafelagið setti seg HINVEGIN í samband við blaðstjóran, beint eftir at yvirlýsingin var honum send, og tá ið til bar at sleppa ígjøgnum umvegis telefonina.

Undirritaði formaður í Blaðmannafelagið skal vera tann fyrsti at viðganga, at tað var óheppið, at felagið ikki hevði fingið samband við blaðstjóran áðrenn yvirlýsingin var send, og tað vóru hesi boðini, blaðstjórin fekk í telefonini.

Eirikur Lindenskov skrivar »Tá eg so royni at forklára honum, at hann er formaður í mínum fakfelag, so slakar hann kortini og biður um umbering.«

Undirritaði og Blaðmannafelagið hevur hvørki slakað ella biðið um umbering fyri innihaldið. Tað er beinleiðis skeivt, tá ið Eirikur Lindenskov skrivar tað. Blaðmannafelagið stendur við hvørjum orði.

Aðrar illgitingar í lesarabrævinum hjá blaðstjóranun á Sosialinum, fari egikki at svara. Ein blaðstjóri á odda fyri einari tíðindadeild við dugnaligum journalistum, átti at vita betri.

# Margháttligur fakfelagspolitikkur

EIRIKUR LINDENSKOV
Blaðstjóri

Kl 7 hósmorgunin var »yvirlýsingin« frá Føroya Blaðmannafelag at hoyra í útvarpinum – eisini var samrøða við Heina Gaard. Kl 9:06 sama dag fái eg yvirlýsingina í teldupostí. Kl 9:42 verður sama yvirlýsing send Sosialinum.

Heini Gaard hevur IKKI ringt til mín, hvørki heim til hús, á fartelefon ella á Sosialin. Hann hevur ikki sent mær teldupost og hevur ikki sent mær SMS-boð.

Hinvegin sendi eg honum ein teldupost kl 10:07 sama morgun. Hann svaraði mær og ringdi síðani til mín, har hann segði, at hann vónaði ikki, at eg tók málið persónliga. Sjálvandi gjørdi eg tað, segði honum, og hann bað um umbering, spurdi hvat eg helt hann skuldi gera, og minti á, at felagið framvegis var mítt fakfelag.

Hann viðgekk eisini, at hann IKKI hevði roynt at fingið fatur á mær, tí tað var ikki neyðugt, tí eg havði havt 600 møguleikar at úttala meg til útvarpið.

Eingin frá Dimmu - uttan myndamaðurin, setti seg í samband við meg, hóast trý fólk har – umframt Heina Gaard – hava skrivað um málið.

Tað undrar meg almikið. Tað, sum formaður blaðmannafelagsins er í holt við í hesum máli hevur eftir mínum tykki als einki við fakfelagspolitikk at gera.

